

Hanus Kamban og Ingi Mohr við Leynavatn í 1960

MYND: JÓGVAN Á DUL

# INGI MOHR OG PRELIMINERSKÚLIN

## HUGLEIÐINGAR UM UNGDÓM, SAKLOYSI, ROMANTIKK OG TRÚSKAP



HUGLEIÐINGAR

HANUS KAMBAN
h.kamban@kallnet.fo

Á vári 1956, nakað áðrenn vit fluttu til Havnar, var sviin Steen Nordenskjöld suðuri í Skúgvi, á einum av sínum mongu ferðum har. Hann skuldi filma skúgv, soleiðis sum hann ber seg at í verpingartíðini, og eg varð biðin um at fara við honum og bera tey heldur tungu fototólini. Upptøkan varð gjørd á tí vallaða lendinum, oman frá eggini, nakað miðskeiðis millum Vatnsdal og Botn. Helst hevur hann spurt meg um mína framtíð, tí eg minnist, at á heimferðini, meðan vit steðgaðu á og rindaðu møðina, hugsaði eg um, at nú skuldi ein fara til Havnar at læra eingilskt, týskt, franskt og latín. Framtíðin glógvaði fyrijáttandi, sum ein dreymur.

Tvær vikur eftir ólavsøku, stutta tíð eftir at okkara familja var komin til Havnar at búgva, hittust vit so øll úti á VBV. Sólin skein henda dagin, rættiligt skúlagongd var ongin, men næmingar og lærarar gingu ein túr. Sama dag blivu klassarnir skipaðir, og vit, sum skuldu byrja í 1. preliminer, vórðu býtt sundur í ein a-flokk og ein b-flokk. Skúlastovurnar vóru uppi á loftinum, onnur var heldur lítil og undir eini væðing, og tí varð gjørt av at býta sundur eftir støðd, so vit í b-flokkinum vóru miðalhøg ella lægri.

Vit vóru, um ein líknar við nútíðar skúlamentan, ein heldur lítil flokkur. Genturnar vóru Sólvá, Elin, Hjørdis, Jutta, Elisabeth, Jóhanna og – seinni – Judith og Elise Fiege. Dreingirnir vóru Georg, Páll, Jákup, Jógvan á Dul, Jógvan Hammer, Hans Andrias, Ingi Jacobsen, Ingi Mohr, Finnur, Kristoffur, Werner og undirritaði. Fýra gjørdu ikki skúlan lidnan.

Hetta skiftið var mest at kalla eitt rituelt vegamóti, bygdin var løgd aftur um bak, ein var nú ungur borgari á einum lítlum plássi, sum samstundis hevði býarins týðiliga merki, við bryggju, havn, skipasmiðju, handlum, konsertum, dansihúsum og biografum. Mong okkara vóru børn og vaksin í senn, moyr, óroynd og óbúgvin, vit virdu og hámettu dreingirnar í teimum eldru flokkunum, við teirra fremmandorðum, reypi og respektloysi, og tað var ikki sørt, at vit dreingir vóru hugtiknir av summum av teimum eldru gentunum.

> Nøkur deydlig tíð var hetta ikki, Útvarp Føroya kom, Føroya Rithøvundafelag varð stovnað, Nasser tjóðartók Suez-veitina, russar sendu tann fyrsta fylgisveinin út í rúmdina, føroyskur poppur tók seg upp og fekk veingir.

Nøkur deydlig tíð var hetta ikki, Útvarp Føroya kom, Føroya Rithøvundafelag varð stovnað, Nasser tjóðartók Suez-veitina, russar sendu tann fyrsta fylgisveinin út í rúmdina, føroyskur poppur tók seg upp og fekk veingir. Brátt varð eg valdur inn í nevndina í okkara næmingafelag og gjørdist skrivari. Felagslívið blómaði, við kjakfundum, bátsferðum, onkrum sjónleiki, kappingum og veitslum. Í okkara blaði, Vitanum, slapp ein at royna sítt kynstur.

Beint nú varð sipað til løgarsteinarnar millum tað at vera barn og tað at vera vaksin, og eg kann bara ikki ætla, hvussu barnslig mong okkara vóru, samstundis sum vit lærdu um Aleksandur Mikla og Goethe, pi, Herman Bang og Shakespeare.

Gott grannalag var í okkara flokki, men av onkrari orsøk vóru vit fýra dreingir, sum eftir stuttari tíð høvdu myndað ein serligan bólk, ella eitt politbýro, og tað vóru Ingi Mohr, Finnur Jacobsen, Ingi Jacobsen og undirritaði. Finnur var sonur Heina, róptur Heini Kjøt, tí hann hevði kjøthandil á Áarvegnum, hann var úr Mikinesi, og Ingi, við sama eftirnavni, var svíningur, sonur Edward í Svínoy.

Vit, tveir havnardreingir og tveir útoyggjadreingir, nevndu okkara serliga harkalið HIFI, eftir okkara forbókstavum. HIFI sendi út tvey skriv, sum fingu ávirkan á heimssøguna, eitt bræv til guvernørin George Wallace í Little Rock, Alabama, sum varð átalaður strangliga og biðin um sum skjótast at gevast við at fremja ágang og mismun móti nekarum í statinum, og eitt til tann amerikanska forsetan Eisenhower, sum varð róstur fyri sína manniligu støðu í hesum máli. Herurin legði uppí, og nekarar fingu atgongd til hægri lestrarstovnar. Nú, stíva hálva øld seinni, er Barack Obama forseti í USA. Sig so, at føringar ikki megna at gera uttanríkispolitiskar skreytir!

Finnur, ein heldur lágur, mjávaksin drongur, við einum ljósum doddi, altíð smílandi, var tann føddi sangfuglurin, hann visti alt um popptónleik og dugdi tíðarinnar sangir. Familjan búði í eini íbúð uppi yvir har Gunnar Stockholm hevði handil, eg minnist meg hava verið har einar tvær ferðir. Hinvegin var eg ofta Úti á Reyni, har Brynhild, mamma Inga og Martin Petersen úr Funningi, seinni maður hennara, búðu. Millum meg og Inga vaks fram ein vinskapur, sum helt sær øll árini, líka til boð vóru eftir honum fyrr í ár.

Saman spældu vit úti á Skansanum, gingu túrar í Viðalundini, sóu Ursus, ta íslendsku bjørnina, vísa sína styrki í Sjónleikarhúsinum, og konu hansara sítt kynstur sum, minnist meg rætt, sangari og gittar- ella banjoleikari. Vit skiftu orð um bókmentir, heimspeki og søgu og sóu filmin Klodernes Kamp (hetta var heitið, vit brúktu) í Havnar Klubba. Faðir Inga, Gunnar Mohr, hevði verið býarskrivari og var gitin bókasavnari. Hann átti summar føroyskar bøkur í fleiri eintøkum, og frá Inga fekk eg til gávus smásøgurnar eftir Guy de Maupassant, sum Jákup doktari týddi á sinni. Abbi Inga, Ísakur, skómakari úr Mikinesi, var tá vanliga at síggja á Áarvegnum. Hann var framsíggin, segði Ingi, tað mundi vera ein ivasom gáva, tí tá ið tað lagið var á honum, bað hann fólk ikki ganga aftan fyri seg. Hann ynskti ongum ta lagnu at gerast framsíggin.

Sum tíðin leið, vaknaði og vaks áhugin fyri hinum kyninum, og fyri Inga, sum var ógvuliga kensluborin av lyndi, og kundi vera bráðsintur, fekk hetta avleiðingar. Hann hevði sæð eina undurvakra, brúnhærda, smílandi gentu av Eiði, og við tað, at hjá honum var sum oftast skamt millum tanka og gerð, birtist skjótt eitt vinarlag millum hansara og Onnu, sum var, sum tað sýntist, tann stóri romantikkurin.

Ingi var drongurin við teimum mongu hugskotunum, og eitt summarið fóru vit báðir útferð til Funnings og gistu í heiminum hjá Martini. Úr Funningi spákaðu vit gjøgnum hagan til Eiðis at vitja gentuna hjá Inga. Minnist meg rætt, fóru vit aftur til Funnings sama kvøld. Í húsinum var ein eldri, lágur, álvarsamur maður við brillum. Ivaleyst hava vit herskað heldur illa, nú leggingartíð var, tí brádliga kom hesin